Hitt fría orðið

At viðhaldsfólkini hjá ymsu ítróttarfeløgunum ikki duga sær hógv, hevur viðført, at flestu kjakforumini hjá hesum eru horvin

FÓTBÓLTSKJAK
Jákup Mørk

So hvørt sum alnetið er vorðið ein slt størri partur av gerandisdegnum hjá okkum, hava felagsskapir av ymsum slag gjørt alsamt størri nýtslu av hesum, í royndunum at kunna um tað virksemi, sum hesir standa fyri.

Føroysku fótbóltsfeløgini hava einki undantak verið í so máta. Heimasíður av bæði almennum og óalmennum slag hava stungið seg upp, og hjá viðhaldsfólkunum man tað so hvørt hava verið ein partur av degnum, at logga seg inn á www.hb.fo, www.nsi.fo ella aðrar heimasíður, har upplýsingar um júst teirra felag hevur verið at síggja.

Eins og hjá flestu av hinum almennu fótbóltsheimasíðunum er kjaktorgið á www.hb.fo stongt í løtuni

Kjakið

Á fleiri av hesum síðum hevur ein partur av tilfarinum verið sonevnd kjakforum, har viðhaldsfólk - og eisini mótstøðufólk - hava givið sítt íkast til kjak um ymisk evni.

Hesi hava fevnt um at kalla øll viðurskifti í feløgunum. Onkur hevur tosað um leiðsluhátt, onnur um samanseting av liðnum, og meðan su mmi hava borið rós, hava onnur verið atfinningarsom.

Tó at hesi kjakforum uttan iva hava verið millum mest vitjaðu partarnar í hesum síðum, so eru flestu teirra nú stongd, og orsøkin er, at vit fáa ikki strikað eina einstaka viðmerking, uttan at alt evnið - ella tráðurin – samstundis verður strikað. Hetta ger, at eitt annars gott og konstruktivt kjak verður strikað, bara tí ein einstakur viðmerkjari kemur við onkrari grovari útspilling, sum vit ikki vilja hava á síðuni.

- Í løtuni arbeiða vit so at finna eina loysn á hesum, og ætlanin er so avgjørt, at kjakið eisini verður ein møguleiki á síðuni í framtíðini. Sjálvandi verður framvegis neyðugt við sensuri, og vit vilja framvegis ikki hava útspillingar standandi á síðuni, men hinvegin haldi eg kjakið eisini hevur borið somikið nógv positivt við sær, at tað avgjørt skal vera til staðar, sigur altso webmastarin á www.hb.fo at enda.

ara, og tíansheldur nakað kristið navn.

Ein av teimum fótbóltssíðum, sum hevur verið mest vitjað í so máta, og sum uttan iva kann skýrast mest vitjaði føroyska fótbóltssíðan, er tann hjá HB. Har hevur kjakið í langa tíð verið ein av føstu tættunum, men nú hava tey so eisini gjørt av at avtaka hetta fyribils.

Vit hava spurt Marna Mortensen, sum er webmaster á heimasíðuni, og boðini frá honum eru eisini, at talan ov ofta gjørdist um útspillingar á síðuni.

- Hetta var tó ikki einasti trupulleikin, sum vit høvdu við kjakinum, og hetta merkir ikki, at kjakið ongan tíð aftur gerst ein partur av síðuni, sigur hann.

- Vit hava alla tíðina hildið, at kjakið eigur at vera ein náttúrligur partur av heimasíðuni, men í okkara føri hevur tekniski leisturin í kjakinum verið eitt sindur óheppin.

- Kjakforumið er soleiðis bygt upp, at tá eitt evnið verður upprættað, ber til hjá teimum vitjandi at gera beinleiðis útspillingar av fólki, har hin skrivandi ikki so mikið sum setir eina e-mail adressu sum avsendtykist vera hin sama alla staðni. Tað eru ov nógv av teimum vitjandi, sum als ikki kenna sær hógv, og verður talan tí ofta um viðmerkingar til hetta. Allar hesar viðmerkingar verða ketaðar saman, soleiðis at til ber at fylgja kjakinum. Trupulleikin við hesum er, at vit fáa ikki strikað eina einstaka viðmerking, uttan at alt evnið - ella tráðurin – samstundis verður strikað. Hetta ger, at eitt annars gott og konstruktivt kjak verður strikað, bara tí ein einstakur viðmerkjari kemur við onkrari grovari útspilling, sum vit ikki vilja hava á síðuni.

- Í løtuni arbeiða vit so at finna eina loysn á hesum, og ætlanin er so avgjørt, at kjakið eisini verður ein møguleiki á síðuni í framtíðini. Sjálvandi verður framvegis neyðugt við sensuri, og vit vilja framvegis ikki hava útspillingar standandi á síðuni, men hinvegin haldi eg kjakið eisini hevur borið somikið nógv positivt við sær, at tað avgjørt skal vera til staðar, sigur altso webmastarin á www.hb.fo at enda.

Feðgar á ferð

Hóast aðrudeildarliðið hjá GÍ noyðist niður í triðju deild, so eru tey í Gøtu kortini nakað heilt fyri seg

FEÐGAR
Jákup Mørk

Tað serliga við næst besta liðnum hjá GÍ í ár er, at í onkrum av dystnum hava einir feðgar verið á liðnum.

Talan er um teir báðar, Símun Petur og Bjarna Justinussen. Símun Petur hevur flestum kunnugt verið ein av drúgvastu gøtumonnunum í fyrstu deild, og hóast hann fleiri ferðir boðaði frá, at nú var nokk, so hevur fyrrverandi toppskjúttin ferð eftir ferð verið at sæð á liðnum, sum hevur verið hitt mest vinnandi, síðani teir í 1980 fyri fyrstu ferð áttu umboð í bestu deildini.

Feðgarnir báðir, Símun Petur og Bjarni Justinussen, hava í ár leikt saman á næst besta liðnum hjá GÍ

Mynd: Ásloakur Nesá

Hevur arvað okkurt

Bjarni Justinussen er enn ikki vorðin eitt navn, sum ítróttarhugaði føroyingurin bítur merki í, men hevur hann arva ein part av evnunum hjá pápanuim, so er tað als ikki óhugsandi, at navnið verður alt meira kent komandi árini.

Longu í dystinum móti ÍF fyri tveimum vikum síðani var um reppið, at Bjarni veruliga setti ljós á seg sjálvan. Eins og Símun Petur so ofta hevur skotið ella stútað týdningarmikil mál fyri GÍ, so nýtti Bjarni høvdið til at skora við í tí dystinum, men nóg mikið stig gjørdist tað kortini ikki.

Saman við hinum úrslitunum í ár hevur hetta so viðført, at ferðin hjá feðgunum í ár gongur niður í triðju deild, men tað er so als ikki víst, at hon steðgar har, og so als ikki, tá talan er um fótbóltsspælarar úr Gøtu við eftirnavninum, Justinussen.

Springarar eru eisini undir reglugerð

Í samband við ólógliga springaradrápið í Sandagerði í týsdagin skrivaðu vit, at ongar fyriskipanir eru fyri býti, tá springarar leggja beinini. Soleiðis var fyrr, men í 1998 var hetta broytt. Í eini broyting í reglugerðini um grind frá apríl 1998 eru springarar tiknir við í løgtingslógina um hvalaveiðu. Hendan staðfestir, sum vit skrivaðu, at sýslumaðurin er ovasti myndugleikin, og tað er hann sum gevur loyvi at halda springarum til og sum stendur fyri skiftinum. Tá grind hevur stóran áhuga, so prenta vit niðanfyri alla kunngerðina um grind.

Nr. 46 8. apríl

Kunngerð um grind.

Við heimild í §3 í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu við seinni broytingum og § 17 í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum við seinni broytingum verður fyrisett:

I. Um eftirlit við grind.

§ 1. Føroya Landsstýri er hægsti myndugleiki í øllum málum viðvíkjandi grind.

Stk. 2. Landsstýrið kann við kunngerð áseta bráðfeingis bann fyri grindadrápi í ávísum grindaumdømum.

Stk. 3. Bannið eftir stk. 2 verður ikki ásett, uttan at onnur grindaumdømi hava fingið høvi at seta fram ynski um at skifta grind úr avvarðandi grindaumdømi, samanber §18, nr. 9.

§ 2. Sýslumaðurin stílar fyri grindadrápi og hevur eftirlit við, at rakstur og dráp fara fram eftir reglunum, og skal hann saman við grindaformonnunum ansa eftir, at ein og hvør ger skyldu sína.

Stk. 2. Á hvørjum ári ger sýslumaðurin grindalistar, sum eru yvirlit yvir fólkatal í grindaumdømminum, og hvussu tað er býtt millum bátar ella aðra samskipan. Sýslumaðurin kann í samráð við hvørja einstaka kommunu avgera, hvussu grindalistin skal skipast, herundir um fólkayvirlitið í kommununi skal nýtast ella onnur skipan gerast. Grindalistin skal liggja almennt frammi.

Stk. 3. Ein samskipan, annaðhvørt tað er til bát ella á annan hátt, kann ikki hava færri partar enn 50, um so er, at avvarðandi bygd er so stór.

§ 3. Bátseigarin ella maður í hansara stað er formaður á báti, og skulu sýslumaðurin/grindaformenninir til eina og hvørja tíð kunna krevja upplýsingar um, hvør er formaður.

Stk. 2. Bátsformaðurin hevur ábyrgd av, at allir bátsmenninir gera sína skyldu.

Stk. 3. Bátur, sum fer í grind, skal vera merktur við havnakenningartekini.

§ 4. Til hvørja hvalvág verða 4 mans uppnevndir til grindaformenn og 2 tiltaksmenn umframt.

Stk. 2. Hesir menn stíla fyri grindini, um sýslumaðurin ikki er til staðar, og skulu teir gjølliga útinna alt, sum er álagt sýslumanninum/teimum í kunngerðini.

Stk. 3. Sýslumaðurin uppnevnir grindaformenninar eftir ummæli frá bygdaráðnum (býráðnum) fyri 5 ár. Um semja er millum grindamenn á staðnum, er loyvt at halda fram at velja grindaformenn, sum vanligt hevur verið, og sýslumaðurin uppnevnir síðan hesar. Sýslumaðurin hevur harumframt heimild til at boðsenda ella bráðfeingis seta aðrar grindaformenn, um hann heldur tað vera neyðugt. Sýslumaðurin kann eisini avgera, at uppnevndir grindaformenn skulu vera grindaformenn fyri fyribilsgóðkenda hvalvág.

Stk. 4. Eingin undir 60 ár kann sýta fyri at verða grindaformaður.

II. Um grindaboð og reiðskap, sum hvør grindabátur skal hava.

§ 5. Tá bátur sær grind, skal hann beinanvegin, sum vanligt er, hava upp á mastur og um tilber boða frá til sýslumannin, sum letur boðini víðari, samstundis sum hann ger vart við møguligt forboð fyri at drepa grind sambært § 1, stk. 2.

Stk. 2. Verður grind sædd av landi, verður farið fram á sama hátt.

§ 6. Formaðurin á hvørjum báti, ið fer í grind, hevur skyldu at ansa eftir, at vanligur grindareiðskapur er umborð.

Stk. 2. Vanligur grindareiðskapur er fastakast, leysakast, sóknarongul/blásturkrókur við línu (sissal og/ella manilla), brýni og grindaknívur.

Stk. 3. Forboð er fyri at nýta annan reiðskap enn tann, sum er nevndur í stk. 2. Tó kunna, eftir serligum loyvi frá landsstýrinum í hvørjum einstøkum føri, royndir gerast við reiðskapi, hvørs endamál er at bøta um drápsháttin. Hetta skal fyriskipast av landsstýrinum.

§ 7. Sýslumaðurin og grindaformenninir skulu, tá ið teir fara í grind, hava Merkið ella serligt av landsstýrinum góðkent eyðkennismerki uppi á eini stuttari stong, sum skal standa aftast í bátinum. Rópari kann vera á formansbátinum.

Stk. 2. Á landi skulu sýslumaður, grindaformenn og vaktarmenn hava kort ella eyðkennismerki sambært stk. 1, sum prógvar myndugleika teirra.

III. Um grindarakstur og -dráp.

§ 8. Sýslumenninir og/ella grindaformenninir úr teimum ymsu hvalvágunum taka eftir at hava samráðst við finningarbátin, avgerð um, hvønn veg grindin skal verða rikin. Grindin skal rekast á góðkenda hvalvág smb. § 9. Grindaformenn hava skyldu at fylgja teimum boðum, sum sýslumenninir geva eftir hesi grein. Høgligasta hvalvágin skal veljast eftir stødd á grind, 1íkindum og streymviðurskiftum. Ikki er loyvt at reka grind uttan undir fyriskipan av sýslumonnum og/ella grindaformonnum.

Stk. 2. Einhvør, sum hevur skyldu at hava eftirlit við grind, skal beinanvegin, hann er komin til grindina, ansa eftir, at reglurnar um grindarakstur verða hildnar.

Stk. 3. Luttakararnir hava skyldu at fylgja teimum boðum og forboðum, sum sýslumaðurin og/ella grindaformaðurin tekur avgerð um í hesum sambandi.

§ 9. Landsstýrið lýsir í serligari kunngerð navnið á góðkendum hvalvágum.

§ 10. Tá ið grindin er komin inn á góðkenda hvalvág, skulu sýslumaðurin og/ella grindaformenn, sum hoyra hvalvánni til, stíla fyri, nær og hvar hon skal verða hildin til, og hvussu fram skal verða farið við drápinum.

Stk. 2. Sýslumaðurin og/ella grindaformenninir skulu skipa fyri, at nóg nógv fólk er á landi til at taka sær av drápinum. Eisini skulu teir skipa fyri, at økið kring hvalvánna verður frítt fyri óviðkomandi fólki, so at grindamenn fáa arbeitt ótarnaðir.

Stk. 3. Tað eigur so mest møguligt at verða strembað eftir, at teir smæstu bátarnir liggja fremst, teir størru bátarnir og skipini skulu liggja uttast og forða og annars - eins og allir aðrir bátar og fólk á landi - útinna tað, ið sýslumaður og/ella grindaformenn geva boð um.

Stk. 4. Tá grindin er komin á land ella so nær landi, at hvalirnir liggja fastir, gevur sýslumaðurin og/ella grindaformaðurin boð um, at nú kann verða skorið á háls. Hvalur, sum ikki er komin at landi, kann verða høgdur frá landi og drigin upp. Ikki kann verða høgt ella skorið á háls frá báti uttan so, at sýslumaðurin og/ella grindaformaðurin hevur givið serligt loyvi til hetta.

Stk. 5. Tá ið skorið verður á háls, skal verða skorið djúpt niður við báðum vangunum og stungið í mønuna. Síðan skal skerast á hálsæðrarnar.

§ 11. Um grind, sum verður hildin til, er størri enn pláss er fyri á hvalvánni, kann sýslumaðurin steðga drápinum. Skipað verður so fyri, at tað, ið eftir er av grindini, verður rikið útaftur.

Stk. 2. Um so er, at fleiri miseydnaðar royndir eru gjørdar at halda grindini til inni á tí hvalvág, hon er rikin, og grindin hvørki fæst at gera landgongd ella kann verða høgd, skal sýslumaðurin saman við grindaformonnunum geva boð um at reka grindina útaftur. Tað sama er galdandi fyri bólkar, sum ganga eftir.

Stk. 3. Allir bátar og fólk á landi hava skyldu at útinna tað, ið sýslumaður og/ella grindaformenn geva boð um.

IV. Um vaktarhald, uppfisking og meting.

§ 12. So skjótt grind er deyð, setir sýslumaðurin og/ella grindaformaður beinanvegin vakt á sjógvi og landi og gevur vaktarmonnunum tørvandi leiðbeining, herundir at varðveita hvalirnar heilar, undantikið oping eftir § 15, merking eftir § 17 og møguliga upplæring í drápsháttinum.

§ 13. Eftir fyriskipan av sýslumanni/grindaformann i skulu hvalirnir verða sleipaðir til annað stað (t.d. bryggju o.t.), heysaðir upp og lagdir har.

Stk. 2. Har hetta ikki er gjørligt, skulu hvalirnir verða drignir niðanfrá og lagdir lið um lið, har sum tað ber til, soleiðis at kúlurnar eru flóðfríar á hægstu flóð.

Stk. 3. Arbeiðinum sambært stk. 1 og 2 hava allir grindamenn og grindabátar skyldu at taka lut í, beint sum grindin er deyð.

Stk. 4. Tá alt neyðugt arbeiði er gjørt, senda grindaformenninir bátar og fólk til lands, og nú verður teknað upp, hvørjir hava tikið lut í rakstri og drápi. Henda upptekning skal verða í seinasta lagi 1 tíma eftir, at neyðuga arbeiðið er liðugt.

Stk. 5. Eingin kann fiska upp uttan loyvi frá sýslumanni ella grindaformonnum. Allir aðrir bátar skulu halda seg burtur.

§ 14. Er ósemja um, hvør ið sambært §§ 12 og 13 er rakstrarmaður, tekur sýslumaðurin avgerð eftir samráð við grindaformenninar.

Stk. 2. Ongin kann bera seg undan at fylgja boðum frá sýslumanninum og/ella grindaformonnum.

§ 15. Vaktarmenninir opa allar hvalirnar, so teir ikki spillast, og teir ansa eftir, at eingin óviðkomandi kemur at hvalunum.

Stk. 2. Eingin kann bera seg undan at fylgja boðum frá vaktarmonnum.

§ 16. Sýslumaðurin tekur so tvey ella um neyðugt fleiri kend, óheft skilafólk at meta grindina, sum gamalt er, eftir góðkendum máli soleiðis, at hvalur, sum er 3,14 m = 5 alin til longdar úr eyga í got, er mettur til gyllin, og hinir mettir hareftir og eisini eftir góðsku.

Stk. 2. Springari og hvessingur verður mettur hvørt drápið sær. Sýslumaðurin ger av, hvussu metast skal.

§ 17. Metingin skal fara fram sum skjótast eftir avtalu millum sýslumann og metingarmenn.

Stk. 2. Metingarmenninir skera í rómartølum skinnatalið og í vanligum tølum numrini á hvalunum, sum so, saman við kyninum á hvalunum og longdini í cm frá fremst á kúluni til gripið á sveivini, verða førd á blað.

V. Um grindaskifti og útlegging.

§ 18. Tá grindin er merkt, skiftir sýslumaðurin og leggur út soleiðis:

1) Finningarfiskur.
2) Vaktarhald.
3) Metingarmenn.
4) Sýslumaðurin.
5) Grindaformenn.
6) Skaðasýnismenn.
7) Skiftishjálp.
8) Drápspartur.
9) Heimapartur/parta hvalur.
10) Annað og avlopsgrind.
11) Tá ið grind ikki verður skift í heimapartar.

Stk. 2. Um sýslumaður, grindaformenn og grindamenn eru samdir um hetta, kann skifti halda fram, so sum siður hevur verið á staðnum, somuleiðis skaðaendurgjald og rudding. Landsstýrið skal hava boð, um so verður gjørt.

1) Finningarfiskur: Bátur, sum finnur grind og fylgir henni til grindaboð eru givin og til aðrir bátar koma til grindina, fær finningarfiskin. Tá ið grind verður fyrst sædd frá landi ella frá báti, sum ikki verður verandi hjá grindini, til aðrir bátar koma, men boðað verður frá henni, fer finningarfiskurin í helvt til teirra, sum boðað hava frá henni, og til bátin, sum er fyrstur til grindina. Á sama hátt verður farið fram, tá boð verða givin úr bygd í aðra, og bátur úr seinnu bygdini er fyrstur til grindina. Teir,

Framhald á síðu 30